Skrivari
til Vinnumálastýrið

Eitt starv sum skrivari í Vinnumálastýrinum er leyst til setan 1. mai 2001 ella eftir nærri avtalu.

Arbeiðið fevnir um vanligt skrivstovuarbeiði, herímillum:
- at vera skrivari hjá landsstýrismanninum
- at rættlesa útgangandi skjøl og frágreiðingar hjá Vinnumálastýrinum
- at umseta til og úr donskum og enskum
- at hava um hendi samskifti við:
  - Løgdeildina á Løgmansskrivstovuni í sambandi við lógaruppskot
  - Løgtingið í sambandi við svar uppá fyrispurningar til landsstýrismannin
- at taka telefon (vekslaran) og taka ímóti fólki
- aðrar skrivstovuuppgávur

Vit hugsa okkum, at tú hevur:
- skrivstovuútbúgving ella aðra hóskandi útbúgving
- kunnleika til almenna fyrisiting
- hollan kunnleika til føroyskt, danskt og enskt
- kunnleika til EDV á brúkarastøði
- góð samstarvsevni

Vit bjóða:
Eitt fjølbroytt og spennandi starv, sum tú sjálv/sjálvur verður við til at skapa, til tíðir strævið, men samstundis sera áhugavert og mennandi við góðum skeið- og eftirútbúgvingarmøguleikum.

Lønar- og setanartreytir
Starvið verður sett sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið. Setanarøkið fevnir um Vinnumálastýrið og stovnar undir tí umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalstýri.

Umsóknir
Umsóknir við prógvum, starvsroyndum o.ø. verða sendar til:

Vinnumálastýrið
Postrúm 377
FO-110 Tórshavn

og mugu vera stýrinum í hendi seinast 25. apríl 2001.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Ara Johanneson, deildarstjóra í Vinnumálastýrinum, tel 35 60 60.

www.fisk.fo

VINNUMÁLASTÝRIÐ

Fíggjarleiðari

KPMG

Fyri Jarðarráðið verður søkt eftir fíggjarleiðara.

Um Jarðarráðið
Virksemið hjá Jarðarráðnum fevnir um:
- Fyrisiting av landsjørðini
- Umsiting av Jarðargrunninum (útlán til landbúnaðin)
- Umsiting av studningsjáttanini til landbúnaðarvinnuna

Jarðarráðið hevur havt virksemi síðan 1938.

Starvið
Talan er um eitt nýtt starv á Jarðarráðnum.

Fíggjarleiðarin fer at hava beinleiðis tilvísing til stjóran og skal hava ábyrgd av stýringini av roknskaparligu og fíggjarligu viðurskiftunum hjá Jarðarráðnum.

Fíggjarleiðarin skal í neyvum samstarvi við stjóran og starvsfólkini á Jarðarráðnum skipa fyri innanhýsis mannagongdum í sambandi við veitan av lánum og røkt av núverandi lánum úr Jarðargrunninum.

Eisini fevnir starvið um dagføring og broyting av mannagongdum í sambandi við umsitingina av studningum til landbúnaðarvinnuna.

Bygnaðarbroytingar kunnu verða framdar viðvíkjandi Jarðargrunninum, sum kunnu hava ávirkan á starvið.

Lønin verður sett út frá útbúgving og starvsroyndum.

Umsøkjarin
Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin:
- Hevur hollan ástøðiligan og praktiskan kunnleika til roknskap og fíggjarviðurskifti
- Er vanur at arbeiða við teldu, serliga skipanunum: Navision Financial og Microsoft Office
- Dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- Hevur góð samstarvsevni og
- Dugir væl at málbera seg í skrift og talu

Umsóknir
Umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndir skal sendast til KPMG statsaut. revisorar Sp/f í seinasta lagi 18. apríl 2001.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Súna Schwartz Jacobsen ella John Petersen á tel 34 34 34.

Allar upplýsingar og umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

www.fisk.fo

KPMG statsaut. revisorar Sp/f
Postsmoga 3258, FO-110 Tórshavn, Tel 34 34 34, Fax 34 34 35

Frá S&K-felagnum

Lýst verður til eykaaðalfund í hølum Føroya Arbeiðarafelags,Tjarnardeild 5, Tórshavn,

leygardagin 7. apríl 2001, kl. 15.00.

Dagskrá: Støðutakan til arbeiðssteðg.

Nevndin

Halt feriu í Praag

Summarhús og íbúðir bíliga til leigu uttan fyri Praag.

Ymiskir prísir og støddir.

Áhugað kunnu ringja á tlf. 0045 98581719 ella 316800.

Íslendskur lestrarstuðul

Íslendska mentamálaráðuneytið bjóðar einum føroyingi stuðul (60.000 ísl. kr. um mánaðin í 8 mánaðir) til lestur í íslendskum frøðigreinum á heimspekideild Háskóla Íslands lestrarárið 2001/02. Upphæddin røkkur til vistarhald. Studentinum verður útvegað innivist á studentagarði, og húsaleigan verður goldin av studninginum.

Námið byrjar 1. september og endar 1. mai.

Umsóknir skulu vera Setursskrivstovuni í hendi í seinasta lagi mánadagin 23. apríl 2001. Umsóknarblaðið fæst á Setursskrivstovuni.

Fróðskaparsetur Føroya
Setursskrivstovan
J.C. Svabos gøtu 14
Postboks 272
110 Tórshavn
tlf. 315302, fax 318929

Bygningur í Vágsbotni

til leigu.

Sp/f Jensen · Tlf. 314740